
Olympic Challenger.

# Valdi at koma til Føroyar at bunkra

**Jógvan Hugo Gardar**

18.05.2015 - 14:50

Oljan.fo

Um vikuskiftið kom tað góðar 105 metrar langa frálandaskipið Olympic Challenger á vitjan í Havn, fyri at bunkra.

Skipið, ið norska reiðaríið Olympic Shipping eigur, hevur uppgávur á Schiehallion-økinum. Hja Faroe Ship, ið umboðar Olympic Shipping í Føroyum, fáa vit upplýst at teir valdu at koma til Føroyar, tí siglingartíðin var á leið tann sama sum til Lerwich, og tá føroyingar kundu bjóða minst líka góða tænastu sum í Hetlandi, so valdu teir at koma til Føroyar.

Olympic Challenger er farin aftur til Schiehallion at røkja sínar uppgávur har.

Talan er um eitt rættuliga stórt frálandaskip, eitt sokallað ROV-skip, ið er bygt á Aker Yards í Aukra í Noregi. Manningin telur um 40 persónar á hvørjari vakt, og teir hava tvær

vaktir. Annars hevur Olympic Challenger møguleika fyri at hava 100 persónar umborð samstundis.

*Meir kann lesast um hvat fyri slag av skipið talan er um í hesi umrøðuni hjá Skipsrevyen*



